
Ben Arabo, stjóri á Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum hevði 218 milliónir í halli

**Jógvan Hugo Gardar**

25.03.2015 - 14:57

Oljan.fo

Fyrrapartin legði Ben Arabo, stjóri, fram rokniskapin hjá Atlantic Petroleum fyri 2014. Framløgan var í Oslo, har greinarar og íleggjarar fingu eina gjøgnumgongd av gongdini hjá felagnum farna árið.

- Vit kunnu ikki vera nøgd, tá vit hava eitt undirskot uppá 218 milliónir krónur. Hinvegin so hava tey flestu oljufeløgini lagt fram rokniskapir sum vísa hall fyri alt 2014. Oljuprísurin sæst aftur í rokniskapinum. So vit eru ikki einsamøll, men eg haldi at vit álíkavæl hava klára okkum hampuligt, samanborið við onnur feløg, segði Ben Arabo við Oljan.fo.

Rakstrarúrslitið hjá felagnum var 124 milliónur krónur. Ben Arabo sigur at hallið fyrst og fremst eitt úrslit av niðurskrivingum av virðinum av ognum felagsins orsaka av fallandi oljuprísum.

Hann leggur afturat, at hóast gongdin ikki gekk heilt eftir vild, so er hann bjarrtskygdur fyri 2015, tí bæði í norskum og bretskum sjógvi er Atlantic Petroleum við í áhugaverdum olju- og gassætlanum.

Mánadagin byrjaðu teir at bora á Roald Rygg í norskum sjógvi. Hendan boriætlanin tekur umleið 30 dagar, og roknast kann við, at vit um ein mánað ella so, fáa at vita um hendan ætlanin kann roknast við skal geva gass, og kanska olju eisini.